16.11.2018

Evnisvika

Góðu foreldur!

Í komandi viku (vika 47) fer allur Eysturskúlin at hava evnisviku. Vit fara at arbeiða við evninum bygd og býur.

Hesa vikuna hava vit ikki vanliga tímatalvu men fara at arbeiða kreativt saman, øll grunddeildin.

Børnini skulu bert hava pennahúsa og matpakka og drekkidunk við hesar dagar. Pennahúsin skal innihalda: blýantar, blýantspískara, viskileður, linjál, saks og límstift. Børnini mugu eisini hava litblýantar ella tussjir við.

Hesar dagar er skúladagurin hjá børnini frá kl.8.00 til 13.00. Vit byrja við morgunsangi, eins og vit gera vanligar skúladagar.

Vit hava gjørt avtalu við frítíðarskúlan, og tey heinta børnini hvønn dag kl.13.00.

Hava tit spurningar hesum viðvíkjandi, kunnu tit venda tykkum til flokslærararnar.

Blíðar heilsanir

Toymið í grunddeildini